# Avbjóðing at finna røttu loysnina í ríkisfelagsskapinum

*Edmund Joensen sigur heldur, at nýggja veljarakanningin heilt greitt vísir, at føroyingar ynskja at varðveita ríkisfelagsskapin og vælferðina. Nú eigur andstøðan uppgávuna at finna bestu loysnina til hetta, heldur hann*



JOHN JOHANNESSEN

– Nýggja veljarakannigin vísir, at tveir triðingar at Føroya fólki eru ímóti fullveldisætlanini. Somuleiðis sýna aðrar kanningar, at tveir triðingar ynskja eina nýggja skipan innan fyri ríkisfelagsskapin. Hetta eigur landsstýrið at virða og leggja frá sær ella broyta ætlanina, heldur Edmund Joensen.

Formaður Sambandsfloksins vísir á, at Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin hava gjørt greitt, at teir hava eitt alternativ til fullveldisætlanina. Hetta gjørdu teir, tá teir í felag skrivaðu tilmæli til landsstýrið eftir viðgerina í uttanlandsnevndini av samráðingaruppritinum.

Hetta alternativ inniber, at Føroyar skulu fáa eina nýggja skipan við Danmark, ið gevur okkum víðkað sjálvræði innan fyri ríkisfelagsskapin. Men hvussu modellið fyri hesi loysn skal síggja út, sær Edmund Joensen sum eina stóra uppgávu hjá andstøðuflokkunum at finna út av. Í tilmælinum til landsstýrið vístu teir báðir stóru andstøðuflokkarnir nevniliga ikki á nakað felags álit. Í staðin vísti Javnaðarflokkurin á sítt sjálvstýrisuppskot og Sambandsflokkurin á sítt nýskipanaruppskot.

### Fáa aðrar flokkar við

Edmund Joensen ivast ikki í, at tað fer at eydnast Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum at finna fram til eitt felags modell. Modellið skal hava timælið, gjørt varð í uttanlandsnevndini, sum útgangsstøði, og síðani skulu aðrir flokkar við í samstarvið.

– Tað er ikki nóg mikið, at Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin taka seg saman um eitt nýtt samráðingarupplegg. Talan má vera um eitt samstarv, ið eisini fevnir um Fólkaflokkin og smáu flokkarnir. Vit skulu í veruleikanum finna fram til eina semju, ið allir flokkar uttan Tjóðveldisflokkurin standa aftan fyri, sigur Edmund Joensen.

Slíka semju trýr Edmund Joensen tað bera til at finna fram til. Hann vísir á, at vit seinastu tíðina hava fingið heilt greiðar ábendingar um, at veljararnir ikki taka undir við tí leisti samgongan og serliga Tjóðveldisflokkurin førir í ríkisrættarliga spurninginum.

### Tveir møguleikar

Edmund Joensen sær tveir møguleikar fyri, at Føroyar fara undir nýggjar samráðingar um ríkisrættarligu støðuna. Ein møguleiki er, at samgongan eftir úrslitið av veljarakanningini tekur til eftirtektar og letur nýggja samgongu sleppa framat. Hon møguleikin er, at samgongan letur tekur bakkar og tekur andstøðuna við í málið um ríkisrættarligu støðuna.

Formaður Sambandsfloksins er vísur í, at fáa vit eina nýggja samgongu, ið leggur seg eftir at fáa víðkað sjálvstýri innan fyri ríkisfelagsskapin, fáa vit veruligt sjálvræði, ið byggir á ein tryggan búskap.

### Mugu varðveita blokkin

Hóast Edmund Joensen heldur, at vit eiga at arbeiða fram ímóti víðkaðum sjálvstýri innan fyri ríkisfelagsskapin, er hann ikki sinnaður fyri at taka av blokkstuðulin. Hann vísir á, at blokkstuðulin ber helvtina av búskapinum og ein triðing av fíggjarlógini, tí er samfelagið ikki ført fyri at klára seg uttan veitingina úr Danmark.

– Vit vita jú, at flest allir búskaparfrøðingar hava víst á, a tað er vandamikið fyri føroyska búskapin, fellur blokkstuðlin burtur. Ein teirra hevur enntá í grein í Dimmalætting víst á, at sjálvt ein skiftistíð á 15 ár, sigur Edmund Joensen.

Undir spurnarorðaskiftinum á fólkatingi herfyri um ríkisrættarligu støðu Føroya komu frá donsku politikarunum fram greiðar ábendingar um, at danir undir øllum umstøðum ynskja blokkstuðulin burtur. Men hetta metir Edmund Joensen vera yvirtulking. Hann vísir á, at tað, danir meina við, er, at tað ikki ber til, at danir veita føroyingum blokkstuðul, um skattaprosentið í Føroyum skal vera nógv lægri, enn tað í Danmark.

– Tað, ið danir meina, er, at vit ikki bert skulu taka ímóti, men eisini geva, sigur Edmund Joensen.

Formaður Sambandsfloksins heldur, at tað kann føra til eina hættisliga støðu fyri føroyska samfelagið, um landsstýrið heldur fram eftir sama leisti í fullveldismálinum. Hann vísir á, at um tað kemur so langt, at ein sáttmáli verður feldur á eini fólkaatkvøðu, førir hetta til pínliga støðu í Føroyum.

## Ársroknskapur 1999

| Rakstrarroknskapur | 1999 | 1998 |
|---|---|---|
| Rentuinntøkur v.m. | 231.744 | 231.489 |
| Rentuútreiðslur v.m. | 78.686 | 89.549 |
| **Rentuinntøkur netto** | **153.058** | **141.940** |
| Vinningsbýti av kapitalpørtum | 55 | 33 |
| Ómaksgjøld og provisiónsinntøkur | 6.235 | 5.292 |
| Útreiðslur til ómaksgjøld og provisiónir | 0 | 0 |
| **Rentu- og ómaksgjøld netto** | **159.348** | **147.265** |
| Virðisjavning av virðisbrøvum og útl. gjaldoyra | -21.803 | 524 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 3.880 | 4.182 |
| Útreiðslur til starvsfólk v.m og umsiting | 96.293 | 95.623 |
| Av- og niðurskrivingar av óítøkiligum og ítøkiligum ognum | 9.454 | 15.821 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | 1.229 | 1.242 |
| Avskrivingar og burturleggingar av skuldarum (netto) | 3.355 | -36 |
| Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum | 58 | -163 |
| **Úrslit av vanligum rakstri** | **31.152** | **39.158** |
| Óvanligar inntøkur | 0 | 0 |
| Óvanligar útreiðslur | 0 | 0 |
| Skattur | 8.656 | 32 |
| **Ársúrslit** | **22.496** | **39.126** |

### Býtið av ágóða

| | | |
|---|---|---|
| Ársúrslit | 22.496 | 39.126 |
| Flutt frá øðrum grunnum | 1.056 | 1.242 |
| **Tøkur peningur tilsamans** | **23.552** | **40.368** |
| Burturlagt til nettouppskrivingargrunn til innara virði | 0 | 216 |
| Burturlagt til aðrar grunnar | 1.055 | 1.242 |
| At flyta til næsta ár | 22.497 | 38.910 |
| **Nýtsla av tøkum peningi** | **23.552** | **40.368** |

| Fíggjarstøða | 1999 | 1998 |
|---|---|---|
| **Ogn** | | |
| Kassapeningur og áogn uttan uppsøgn í tjóðbankum | 244.834 | 85.093 |
| Áogn í lánistovnum | 86.786 | 81.255 |
| Útlán | 2.911.533 | 2.615.018 |
| Lánsbrøv v.m. | 650.678 | 731.791 |
| Partabrøv v.m. | 2.342 | 2.080 |
| Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum | 3.154 | 3.155 |
| Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum | 881 | 821 |
| Óítøkiligar ognir | 0 | 0 |
| Ítøkiligar ognir | 123.342 | 108.144 |
| Onnur ogn | 19.105 | 11.572 |
| Tíðarskeiðsavmarkingar | 3.813 | 3.350 |
| **Ogn tilsamans** | **4.046.468** | **3.642.279** |
| **Skuld** | | |
| Skuld til lánistovnar | 67.262 | 42.271 |
| Innlán | 3.247.556 | 2.895.514 |
| Onnur skuld | 26.474 | 19.950 |
| Tíðarskeiðsavmarkingar | 0 | 0 |
| Burturleggingar til útreiðslur | 4.506 | 6.394 |
| **Eginpeningur:** | | |
| Ábyrgdarfæ | 10.644 | 10.620 |
| Grunnar | 5.500 | 5.500 |
| Nettouppskrivingargrunnur til innara virði | 1.176 | 1.177 |
| Flutt frá undanfarnum árum | 660.853 | 621.943 |
| At flyta frá ársins úrsliti | 22.497 | 38.910 |
| **Eginpeningur tilsamans** | **700.670** | **678.150** |
| **Skuld tilsamans** | **4.046.468** | **3.642.279** |

### Tøl, ið ikki eru tikin við í javnan

| | | |
|---|---|---|
| Ábyrgdir | 40.441 | 33.231 |
| Aðrar skyldur | 112.590 | 45.440 |
| **Tøl, ið ikki eru tikin við í javnan tilsamans** | **153.031** | **78.671** |

FØROYA SPARIKASSI



# Einki fyri útróðrarmenn

*– Í skattamálum verða útróðrarmenn viðgjørdir sum aðrir fiskimenn, tað sama er galdandi fyri arbeiðsloysisskipanina, men hvat viðvíkur lønarhækking og frítíðarløn eru útróðrarmenn ikki undir somu skipan sum aðrir fiskimenn, sigur Jørgen Niclasen í viðmerkingunum til uppskot um mánaðarligan minstaforvinning*

ÓLAVUR Í BEITI

Í viðmerkingunum til uppskotið hjá fiskimálaráðharranum um mánaðarligan minstaforvinning, verður upplýst, at fiskimálaráðharrin setti í desember 1999 ein arbeiðsbólk við umboðum m.a. frá Meginfelag Útróðrarmanna, Fiskimálastýrinum og Vinnumálastýrinum at meta um møguleikan at gera broytingar í verandi skipan við mánaðarligum minstaforvinningi til tess at bøta um inntøkutrygdina hjá teimum, sum hava útróður sum høvuðsvinnu, og at skipanin kundi gerast meira einsháttað við aðrar almennar skipanir, herundir skattaviðurskifti og arbeiðsloysisskipan.

– Arbeiðsbólkurin kom skjótt til ta niðurstøðu, at í skattamálum verða útróðrarmenn viðgjørdir sum aðrir fiskimenn. Tað sama er galdandi fyri arbeiðsloysisskipanina, og at allir bátaeigarar verða viðgjørdir ájavnt við sjálvstøðug vinnurekandi. Hvat viðvíkur lønarhækking og frítíðarløn eru útróðrarmenn ikki undir somu skipan sum aðrir fiskimenn.

### Ynski útróðrarmanna

– Arbeiðsbólkurin hevur víst á tey ynski um broytingar, sum umboðini fyri Meginfelag Útróðrarmanna settu fram í arbeiðsbólkinum. Millum annað var ynskt, at mánaðarligur minstiforvinningur verður avroknaður út frá avrokningini og ikki einum føstum prosenti, at mánaðarligur minstiforvinningur hækkar við sama prosentsatsi sum arbeiðaralønin, at frítíðarløn verður rindað av mánaðarligum minstaforvinningi, og at tað skal bera til at hava summarfrí uttan at detta úr skipanini.

– Um hesi ynski hjá útróðrarmonnum skulu setast í verk, so økist kostnaðurin av skipanini heilt munandi, og játtanin á fíggjarlógini fer ikki at halda. Fyri at spara økingina innaftur vísir arbeiðsbólkurin á møguleikar at økja kravda avreiðingarvirðið soleiðis, at færri bátar verða í skipanini. Semja var ikki um hetta í arbeiðsbólkinum.

Men Jørgen Niclasen ynskir at ganga nøkrum ynskjum á møti m.a. við at loyva møguleikan við summarfrí uttan at detta úr skipanini. Samstundis verður dentur lagdur á, at skipanin ikki elvir til misnýtslu av tølum og veruligum útróðrardøgum og avreiðingum. Eisini má skipanin verða møgulig at umsita.

### 800 krónur upp

Út frá nevndu fortreytum og fyri at bøta um inntøkutrygdina hjá útróðrarmonnum verður skotið upp av fiskimálaráðharranum, at mánaðarligi minstiforvinningurin hækkar við 800 krónum, og avrokningin av hýru verður lækkað niður í 35 prosent av brutto.

– Til tess at meirkostnaðurin verður tikin innaftur verður skotið upp, at kravda avreiðingarvirðið hækkar úr kr. 54.000,- upp í kr. 72.000,- fyri 6 mánaða skeiðið, og minkingin verður hækkað úr 50 oyru upp í 55 oyru fyri hvørja krónu. Hetta merkir, at minstiforvinningurin fellur burtur, tá fiskiparturin fer upp um kr. 16.363,64, sigur Jørgen Niclasen m.a. í viðmerkingunum til uppskotið.



# Landsstýrismaðurin eigur ikki at »delegera«

*Vit kenna søguna um tær 7 kirkjulógirnar, sum fyrra Løgtingið samtykti á sinni, men sum landsstýrismanninum ikki dámdi, og tí ikki vildi seta í verk, sigur Lisbeth L. Petersen m.a. í viðmerkingunum til fyrispurning*

ÓLAVUR Í BEITI

Hørgni Hoydal hevur fingið tveir spurningar at svara frá Lisbeth L. Petersen, og er tann fyrri um, hví ikki allar landsstýriskunngerðir eru avgreiddar í sambandi við nýggju kirkjulógirnar? Og so vil Lisbeth L. Petersen hava at vita, hvussu langt arbeiðið er komið ?

– Tá frágreiðing landsgrannskoðarans um landsroknskapin var til viðgerðar á Løgtingi tann 11. apríl 2000, kom tað fram, at trupulleikar vóru í sambandi við nýggju kirkjulógirnar, og grannskoðarin vísti á, at nógv var ógreitt, tá talan var um Kirkjugrunnin, Kirkjukassarnar og roknskap og eftirlit í sama sambandi.

– Landsstýrismaðurin hevur gjørt kunngerð í sambandi við kirkjugrunnin, og latið tað yvir til stiftsstjórnina sjálva at taka avgerð, og harvið sloppið sær undan at gera reglur. Hetta metir grannskoðanin er skeivt, tí landsstýrismaðurin eigur ikki at „delegera“ hesa uppgávu til aðrar, sigur Lisbeth L. Petersen.

### Svarar ikki

– Somu viðmerking hava teir til avgerð landsstýrismansins, tá talan er um kirkjukassarnar, hvussu fíggjarætlanir skulu setast upp og skipast, og hvussu roknskapir skulu setast upp. Fleiri dømi eru um aðrar viðkomandi spurningar, ið landsgrannskoðanin hevur sett, men landsstýrismaðurin hevur ikki svarað, verður sagt í frágreiðingini.

– Nú í mars mánaði hevur landsstýrismaðurin tó upplýst, at orka hevur ikki verið til at svara, tí arbeitt hevur verið við málinum um at yvirtaka fólkakirkjuna og at gera kunngerðir til nýggju kirkjulógirnar!

– Samstundis síggja vit í fjølmiðlunum, at Prestafelagið hevur havt fund, og har verður sagt, at enn mangla kunngerðir, og rammurnar eru ikki fyltar út, so virkast kann eftir nýggju lógunum, og har verður dømi nevnt um tørvandi heimild at brúka pening til prestaembætini, sum bíðað hevur verið eftir.

– Vit kenna søguna um tær 7 kirkjulógirnar, sum fyrra Løgtingið samtykti á sinni, men sum landsstýrismanninum ikki dámdi, og tí ikki vildi seta í verk. At enda var hesin tó so kroystur, at hann eftir áhaldandi trýsti mátti akta og harvið virða Løgtingsins samtyktir soleiðis, sum honum er álagt sambært lógini, sigur Lisbeth L. Petersen í viðmerkingunum og spyr, tí hon vil hava eitt svar.

